TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## "Leyst" sløkkiliðsfólk



**Sløkkiliðið**

Støðin hevur útgerð til hjálp í sambandi við ferðsluóhapp, oljudálking á sjógvi og landi, húsaskaðar og froskmannaútgerð.

Tað eru 34 fólk knýtt at støðini. 19 eru í føstum starvi, harav 8 eru knýtt at eini vaktarskipan. 1 fólk er á døgnvakt.

Søkt verður eftir "leysum" sløkkiliðsfólki til sløkkiliðið hjá Tórshavnar kommunu.

**Høvuðsuppgávur**
Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, m.a. alt vanligt sløkkiliðsarbeiði, brunafyribyrgjandi uppgávur og bjargingaruppgávur.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at tú hevur handverkaraútbúgving sum td. bilmekanikari, maskinsmiður ella líknandi
Roknað verður við, at tú innan 3 mðr. hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg og víðkað fyrstahjálparprógv.

**Annað**
Umsøkjari má kunna verða á støðini innan 5 minuttir.
Eisini skal umsøkjari útvega reina revsiváttan frá politinum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber, og lønt sambært avtalu.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, varasløkkiliðsstjóra, á tlf. 302100

**Umsókn**
saman við viðmælum, revsiváttan og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar Kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 19.desember 2005 kl. 12.00. Viðmerk á umsóknina »Leyst sløkkiliðsfólk«.

## Starvsfólk

Til sløkkiliðsstøðina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir fólki skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan verður at koyra MBF bussin.
Av øðrum uppgávum kunnu nevnast, viðlíkahald av bussinum og aðrari útgerð á støðini.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar yvir 3500 kg við átekning til vinnuligan fólkaflutning.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála við avvarðandi felag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, varasløkkiliðsstjóra, á tlf. 302100

**Umsókn**
saman við viðmælum, og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. desember 2005 kl. 12.00. Viðmerk á umsóknina »Umsókn MBF-førari«

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Ergo- ella fysioterapeutur til serstovu



**Serstovan**

Serstovan "Bólið" í Øksnagerði er eitt serligt tiltak hjá Tórshavnar kommunu fyri børn við kontakt- og samskiftistrupulleikum. Arbeitt verður miðvíst við at menna samskiftið hjá børnunum í einum skipaðum gerandisdegi, har stórur dentur verður lagdur á visualiering. Pláss eru fyri 10 børnum á stovuni, sum er ein serlig eind í Dagstovninum í Øksnagerði.

Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir eftir ergo- ella fysioterapeuti til serstovuna "Bólið" í Øksnagerði frá 15. januar 2006 til 14. januar 2007.

**Starvið**
Starvið er eitt farloyvisstarv 30 tímar um vikuna í fyribils eitt ár.

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert og mennandi starv, har tú sum starvsfólk verður partur av einum fakligum toymi, sum arbeiðir miðvíst við at menna samskiftið hjá børnunum í einum struktureraðum og visuellum umhvørvi.

**Førleikakrøv**
Vit ynskja at seta eitt fólk við ergo- ella fysioterapeutiskari útbúgving, sum:
- hevur hug og førleika at arbeiða við børnum við serligum tørvi
- er búgvin, kann arbeiða sjálvstøðugt og er opin fyri menning í arbeiðinum.
- hevur hug og evnir at arbeiða skipað í einum tvørfakligum toymi

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er eitt stuðulsfólkastarv og verður lønt sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið ella Føroyskar Fysioterapeutar og Fíggjamálaráðið.
Skipað verður fyri ráðgeving, supervisión og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Gunrid Hansen, pedagogur á serstovuni ella Jesper Roos Nielsen, leiðara av Dagstovninum í Øksnagerði, tlf. 31 99 59

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerð 1, FO-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi leygardagin 17. desember 2006. Viðmerk á umsóknina "Serstovan".

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Dagrøktarar til Tórshavnar Kommunu



Dagrøktarin hevur vanliga 4-5 børn í sínum egna heimi. Hetta gevur tí einstaka barninum tryggar karmar í heimligum umhvørvi.
Til ber at laga gerandisdagin eftir tí tørvi, sum einstaka barnið hevur.

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir dagrøktarum at byrja 15. januar 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða**
eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tú fært hollan stuðul frá kommunalu skipanini.

Fyri at kunna hava børn í dagrøkt er neyðugt, at hølini har børnini verða ansað eru hóskandi. Møguleikar skulu vera til uttandura virksemi.

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Marjun Midjord, dagrøktarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. desember 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

DEKKSØLAN á Selatrað
Vetrardekk á goymslu til jeepar, pick-up's og persónbilar
Vit skifta eisini dekk um kvøldarnar og í vikuskiftunum
SÁMULIGIR PRÍSIR
Tel 218195 & 448195



Vedrið Sosialurin Bilar Lýsingar

i Sosialurin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo